TALV

John Rødgaard skrivar:

Í 5. umfari fór Karpov framum. Og tað fór soleiðis fram:

H: Kasparov
S: Karpov

1. e4	e5	
2. Rif3	Ric6	
3. Bb5	a6	
4. Ba4	Rif6	
5. 0-0	Be7	
6. Re1	b5	
7. Bb3	d6	
8. c3	0-0	
9. h3	Bb7	
10. d4	Re8	
11. Ribd2	Bf8	
12. a4	Fd7	
13. axb5	axb5	
14. Rxa8	Bxa8	
15. d5	Ria5	

Í kappingini undan hesi leikaði Karpov í 46. umfari 15. -, Rid8 og kom heldur illa fyri.


16. Ba2	c6
17. b4	Rib7
18. c4	Rc8
19. dxc6	Fxc6
20. c5?!	

Ilt er at siga hví, men hvítur er longu eitt sindur kroystur. Svartur fær nú eina sterka frífinnu. Tí var 20. Bb2 betri.

20. -	Rid8
21. Bb2	dxc5
22. bxc5	


Nú f7 er vart av Rid8, kann 22. Rixe5 verða svarað við 22. -, Fa6 og seinni 23. -, c4.

22. -	Fxc5
23. Bxe5	Rid7
24. Bb2	Fb4



Var støðan kroyst fyrr, so gjørdist hon beinleiðis vánalig nú. 25. Fb1 hevði verið nógv betri.

25. -	Ric5
26. Ba1	Bxe4
27. Rifd4	Ridb7
28. Fe2	Rid6
29. Rixc5	Fxc5
39. Fg4	Re8
31. Rd1	Bg6
32. Ff4	Fb4
33. Fc1	Be4
34. Re1	Fa4
35. Bb3	Fa8
36. Fb2	b4
37. Re3	Bg6
38. Rxe8	Fxe8
39. Fc1	Rie4
40. Bd5	Ric5
41. Rib3	



Her varð talvið lagt niður, og Kasparov gavst uttan at taka tað uppaftur. Onkur vil halda, at hann burdi roynt at hildið fram, men Kasparov hevur ikki ivast í hegni Karpovs. Og eitt nú eftir 41. -, Rixb3 42. Bxb3, Fe4 er tað bert ein spurningur um tíð.

— o —

Í heimsmeistarakappingini fyri kvinnur er komið til kandidatkappingina.

Hon verður telvað í tveimum umførum, og tær 8, ið verða við, eru: Levitina, Semenova, Litinskaja, Alexandria og Achmylovskaja úr Sovjet, Wu (Kina), Brustman (Polen), og Pia Cramling úr Svøriki. Vinnarin fær rætt at bjóða heimsmeistaranum, Tjiburdanidze, av næsta ár.



Bridge



Landsliðsvenjing

Fyri at hava spælarar at taka burturúr, tá landsliðið skal setast, hevur landsliðsnevndin samlað 24 av okkara frægu spælarum til venjing hvørt mánakvøld. Jógvan Nolsøe, ið er valdur til liðskipara fyri landsliðið, roknar við, at landsliðið, sum skal til Noregs í summar, verður sett tíðliga í vár ella kanska longu í jan./feb. mánað.

Spæld blivu løgd spøl við ymiskum »fidusum« sum trumfstytting, sluttspæli v.m., og er nesin venjingarháttur sera góður at læra spælararnar at taka neyðug fyrivarni, tá kortini sita illa og at venja teir at telja hendurnar upp í hvørjum spæli.

Støðan í FM-kappingunum

Meistararaðið:

	dystir	stig
1. Fyðun Jensen	5	76
2. Áki Mouritsen	5	49
3. Vagnar Olsen	4	48
4. Børge Egholm		
Óli Holm	4	31
6. Marni Gaard	3	28
7. P. Sigm. Sørensen	3	9
8. Rasmus Joensen	3	8

Millumraðið:

Simun Hansen	4	66
Kjartan Nielsen	4	48
Jørgen Hansen	2	32
Leif Pedersen	3	25
N. P. við Reiðlið	3	17
Eli Zachariassen	2	15
Thurid Olsen	4	8

Í millumraðnum hevur liðið hjá Mannbjørn Mortensen skift liðskipara. Nýggjur liðskipari er Niels Pauli við Reiðlið.

Í meistararaðnum er dømd ein »justerað scora« í dystinum Rasmus Joensen — Marni Gaard. Liðið hjá Rasmusi hevði spælt 6 hj-/.1, men bleiv hetta dømt til 6 hj +6.

V/EV	Sp 6 Hj 63 Rú K96543 Kl ED107	
Sp EJ 102 Hj EKJ10542 Rú 10 Kl J	V	N E S Sp K87 Hj 98 Rú EJ872 Kl 985
	Sp D9543 Hj D7 Rú D Kl K6432	

V	N	E	S
2 hj	3rú	Dbl	4 sp[1]
4 UT	p	5 rú	p
6 hj	p	p	p

1) Aðrenn suður meldar 4 sp, upplýsir hann óbiðin, at 3 rú er København-konv. (minnst 5—5 í rútara og spaðara).

Norður spælir wp 6 út, ið vestur tekur við sp 10. Eftir at hava spælt seks ferðir trumf spælir hann sp J fyri at fanga frúnna hjá norðan. Kløkkur gjørdist vestur, tá norður ongan hevði eftir. Suður fekk sostatt eitt spaðara- og eitt kleyvarastikk, men sum nevnt er slemmurin dømdur at vinna.

Tað skuldi gott mótspæl til at seta henda 5 rú:

N/NS	Sp DJ9632 Hj E Rú 1096 Kl K96	
Sp 105 Hj K104 Rú D8 Kl EDJ873	V	N E S Sp K Hj DJ76 Rú EKJ7543 Kl 10
	Sp E874 Hj 98532 Rú 2 Kl 542	

Eystur spælir 5 rú. NS hava ikki meldað annað enn pass. Suður spælir hj 8 til 4 ↑ á vestur og essið hjá norður.

Vestur hevur meldað kleyvara, so norður kann bert vóna, at suður hevur sp ess. Men hvussu fáa hann at spæla hjartara aftur og ikki spaðara?

NS spæla, at útspæl av J lovar D, og norður loysti spurningin við at spæla sp D, ið noktar sp J.

Suður var nú ikki í iva um, at hjartari skuldi aftur.

Mortan

Fleiri tryggingar ið verða teknaðar — ódýrari gjald

Síðani vit í 1940 fóru undir at tryggja móti eldsvanda, er tryggingargjaldið farið niður í helvt.

Tryggið hús, innbúgv, vørur o. a. móti skaða av eldi, stormi, vatnleiðingsbroti og omanlopi. Eisini tryggja vit innbúgv og vørur móti innbrotstjóvarí. Vit tekna eisini glastryggingar.

Eru tað serstøk viðurskifti viðvíkjandi trygging av ogn tygara, ið tygum hava áhuga fyri, geva vit fegnir gjøllari frágreiðing.

Tryggingin hevur eisini umboðsmenn á hesum plássum, ið fegnir eru tygum til hjálpar:

Vági	Sverre Skaalum,	tlf. 73012
Tvøroyri	Hjørleif Enni,	tlf. 71061
Tórshavn	Kjartan Dalsgaard	tlf. 15222
Eiði	Óli Ellingsgaard,	tlf. 23005
Runavík	Havstein Ellingsgård,	tlf. 47055
Klaksvík	Páll Josephsen,	tlf. 55835

FØROYA BRUNATRYGGING

Telefon 17022
Smyrilsvegur 20 — postbox 45
3800 Tórshavn